www.safari.fo

SAFARI TRANSPORT

# Fjølbroytt starv

Vegna økt virksemi søkir Safari Transport eftir m/k til fast starv. Er tú ein persónur ið dámar væl at hava nógv at gera og hava samband við nógv viðskiftafólk er hetta rætta starvið fyri teg.

**Tín førleiki:**

- Sera kundavinarlig/ur
- Tú er sjálvstøðug/ur
- Hevur gott skil á pappírum
- Tað er ein fyrimunur um tú dugir væl føroyskt, danskt og enskt
- Koyrikort er eitt krav

**Tínar uppgávur**

- Bóking av farmi
- Kundaavgreiðsla, serliga um telefon
- Leiðbeina viðskiftafólki
- Samskipa koyringar í Føroyum (Logistik)
- Fakturering
- Koyring av pakkum
- Aðrar umsitingarligar uppgávur

**Vit bjóða tær**

- Eitt sera áhugavert starv har eingin dagur er eins.
- Eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt starv við nógvum avbjóðingum og møguleikum fyri persónligari og yrkisligari menning.

Góð løn til rætta viðkomandi.

Upplýsingar um starvið fært tú frá Knút Lutzen á tel. 363334 / 228833

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til Sp/f Safari Transport, Postboks 3166, FO-110 Tórshavn Att. Knút Lützen, ella sum teldubræv til knut@safari.fo Umsóknin má vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 29. mars

# VILT TÚ SETA TEG Á OVASTU RÓK

## Í EINARI AV VÆLRIKNU FYRITØKUNUM Í FØROYUM

Løvubetong varð stovnað í 1973. Í dag er Løvubetong størsti framleiðari av betong í Føroyum. Harumframt selur felagið cement til aðrar betongframleiðarar og asfaltframleiðarar. Í løtuni starvast 9 fólk hjá Løvubetong

Í december 2006 keypti Thor Contractors Løvubetong. Eigararnir av Thor Contractors, sum er úr Íslandi, eru sterkir aktørar í íslendsku byggivinnuni.

Einingaverksmiðjan (EV), sum framleiðir betongelementir í Íslandi, er partur av Thor Contractors samtakinum. Í EV starvast í dag áleið 80 starvsfólk við hollum kunnleika til at framleiða betongelementir til m.a. íbúðar-, kontór-, og ídnaðarbygningar.

Fleiri upplýsingar um EV finnast á heimasíðu felagsins: www.ev.is

Familjan Mørkøre hevur rikið Løvubetong síðani tað varð stovnað, men nú er stundin komin, at tey ynskja at fáa betri stundir til eisini at røkja onnur áhugamál.

Leitað verður tí eftir einum framfýsnum, ábyrgdarfullum og dugnaligum persóni til starvið sum stjóri í P/F Løvubetong.

**Starvið**
Stjórin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni av Løvubetong við tilvísing til nevndina.

Stjórin fær somuleiðis til uppgávu í samstarvi við Einingaverksmiðjuna at standa fyri byggingini av einum framleiðsluvirki við Norðskála, sum skal framleiða betongelementir. Ætlandi verða 15 til 20 starvsfólk knýtt at hesi framleiðslu.

Eitt starv í einum samtaki sum Thor Contractors kann fyri tann rætta persónin eisini skapa møguleikar fyri, at hann sleppur at royna seg í Íslandi, um áhugi er fyri tí.

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu.

**Umsøkjarin**
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin:

- hevur hollan ástøðiligan og praktiskan kunnleika til byggi-, vinnu- og búskaparlig viðurskifti í Føroyum
- hevur góð samstarvsevni og leiðsluroyndir
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- dugir at málbera seg í skrift og talu (á føroyskum og enskum)

**Umsóknir**
Umsókn saman við prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til **Rasmussen & Weihe, statsaut. revisorar, postboks 30, FO-110 Tórshavn** í seinasta lagi mánadagin 26. mars 2007.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Bjarna Arnason á telefon (+298) 351 700.

Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

ALMANNA- OG HEILSURØKTARAFELAGIÐ
J. Paturssonar gøtu 24 · 100 Tórshavn · Tlf 315670 · ahf@post.olivant.fo

# AÐALFUNDUR

Aðalfundur felagsins verður

**mikudagin 18. apríl 2007 kl. 10.00**

í Pálsstovu, Mykinesgøtu 7, Tórshavn.

Skrá sambært lógum felagsins.

Uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, skulu vera okkum í hendi seinasta lagi 28. mars 2007.

Byrja verður við morgunmati kl. 9.30.

**Almanna- og heilsurøktarafelagið**



# Hús í Klaksvík til sølu

Ognin Undir Fossum 47 til sølu, um hóskandi boð fæst.

**Matr. nr:** 437ax
**Grundøki:** 560 m²
**Húsini:** ca. 62,5m² í trimum hæddum og hava hesi eisini útbygning sum er inngongd og hjallur. Bilhus er á ognini

Hetta eru timburhús frá 1976 á betonggrund og hava eternit tak.

**Ábyrgd tlf. nr. 457791/222252**



# Hús í Klaksvík til sølu

Ognin Vágsheyggjagøta 1 til sølu, um hóskandi boð fæst.

**Matr. nr:** 653
**Grundøki:** 287 m²
**Húsini:** ca. 48m² í trimum hæddum. Á økinum er góður hjallur, úthús og garður er um alt økið. Húsini eru í góðum standi.

**Ábyrgd tlf. nr. 457791/222252**